STARVSFÓLK TIL IKON //

OKKUM TØRVAR TEG OG TVEY ONNUR

Vilt tú gerast partur av einum toymi av dugnaligum starvsfólkum, ið virka fyri, at kundar okkara fáa bestu tænastu, tá tað ræður um samskiftisuppgávur? Og hevur tú hug at koma í starv í eini fyritøku, har tað veruliga hendir nakað og sum hevur stór mál og uppgávur fyri framman? ...so les bara víðari og send okkum eina umsókn

RÁÐGEVI

Vit sóknast eftir einum ráðgeva at veita marknaðarførings- og samskiftistænastur til kundar okkara.

Sum ráðgevi myndar tú felagið mótvegis kundum okkara í samskiftis- og marknaðarføringsuppgávum. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við aðrar ráðgevar, samskiparar og sniðgevar.

Vit vænta at tú hevur hægri útbúgving innan marknaðarføring og/ella samskifti. Somuleiðis er ynskiligt, at tú hevur arbeiðsroyndir í ráðgeving – til dømis frá samskiftisfyritøku ella hollar royndir sum brúkari av ráðgeving á marknaðardeild í størri fyritøku.

Vit leita eftir einum sjálvbjargnum, djørvum og fyrikomandi persóni at røkja hesar avbjóðandi uppgávur.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til Árni Arge, stjóra, á tel 21 53 45.

SNIÐGEVI

Vit vænta at tú hevur útbúgving ella drúgvar royndir sum grafikari/sniðgevi.

Hollur kunnleiki til Adobe Illustrator, Adobe PhotoShop og Adobe InDesign, er ein treyt.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til Henning Nicodemussen, á tel 23 10 74.

TEKSTHØVUNDUR

Er tú tann, ið dugir at fáa tvær heilar síður burtur úr tveimum orðum, og øvugt?

Okkum tørvar ein kreativan teksthøvund, ið dugir væl at málbera seg á føroyskum, og kann arbeiða skjótt og sjálvstøðugt.

Tú kemur at arbeiða tætt saman við okkara kreativa toymi, og skal við krevativari tekstframleiðslu seta dám á uppgávurnar. Somuleiðis skulu tíni evni eisini brúkast til rættlestur og umseting av ymiskum uppgávunum, so tað er ein fyrimunur um tú dugir væl enskt og danskt.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til Árni Arge, stjóra, á tel 21 53 45.

Umsóknir við prógvum o.ø. skulu sendast til:
IKON P/F
Postsmoga 1012
110 Tórshavn
Att.: Árni Arge, stjóri.

ella sum teldupost til arge@ikon.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi seinast 18. august 2008.

Størvini verða at seta skjótast tilber ella eftir avtalu.

!KON P/F // TEL 320 870 // WWW.IKON.FO

IKON P/F er ein nýggj samskiftisfyritøka, sum frá 1. november 2007 yvirtók virksemið hjá reklamuvirkinum Petur & Petur. Flestu av stovnarunum og starvsfólkunum í IKON P/F høvdu tilknýti til Petur & Petur, men harumframt eru roynd og vælútbúgvin fólk sett í starv, og fleiri verða sett í framtíðini. Í løtuni starvast 10 fólk í fyritøkuni, har vit gera samskiftisuppgávur fyri nakrar av størstu fyritøkunum í Føroyum. 1. februar 2008 flutti IKON P/F inn í nýggj og snotulig høli í Lucas Debesargøtu – við síðuna av Auto í miðbýnum í Havn.

# Húskallar – nú skal tað verða



*Teirra stóra come-back varð seinkað í eitt ár. Men hóskvøldið fara Húskallar á pall á SummarFestivalinum í Klaksvík*

**Í fjør varð tað av ongum, men nú royna Húskallar aftur at gera comeback á Summar Festivalinum – og teir gera meira burturúr enn nakrantíð áður**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tað munnu verða fáir bólkar í Føroyum, sum hava klárað at gjørt so nógv um seg sum Húskallar við bara at geva eina útgávu út og spæla nakrar fáar konsertir. Húskallar við kjarnuni úr Leirvík góvu í 1991 eitt kassettubond út, teir spældu nakrar fáar sangir, og tað var tað.

Men tað, sum kundi verið leyst og liðugt – gloymt eftir einari lítlari løtu – gjørdist til eina legendariska útgávu í føroyskum tónleiki. Sangirnir kundi eingin jarða, hóast bólkurin ongantíð fekk veruliga luft undir veingirnar sum konsertbólkur, og hesi mongu árini, síðani útgávuna hjá Húskallum, hava sangir sum Bóndin Hungrar (Knarvakotið), Ria, Hans Ansgar og Aftur Nú verið tráspældir í føroyskum útvarpi.

Og nú skal tað so verða – tað stóra comebackið. Húskallar hava funnið saman aftur, teir eru farnir í venjingarhølini, og á Summar Festivalinum royna teir enn einaferð at gera comeback. Húskallar stóðu á skránni fyri festivalin í fjør, men teirra framførsla varð avlýst.

Hóskvøldið 7.august fara Húskallar at syrgja fyri ársins føroysku kultframførslu á Summarfestivalinum 2007.

Lesið Sosialin - so eru tit við

